# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

**Evni:** Frítíðartilboð til børn við serligum tørvi

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv børn í skúlaaldri frá 3. flokki standa á bíðilista til frítíðartilboð eftir skúlatíð?
2. Hvussu nógv fleiri børn hava tørv á frítíðartilboði til skúlaárið, ið byrjar nú?
3. Er nøkur ítøkilig ætlan at útvega hesum børnum frítíðartilboð í skúlaárinum, sum byrjar nú?
4. Um ja, hvussu er ætlanin at skipa tilboðið, og nær kann væntast, at tilboðið byrjar?

**Viðmerkingar** :
Sambært Almannaverkinum stóðu 31 børn á bíðilista til eitt frítíðartilboð tann 31. mai 2022.

Tá varð sagt, at um tað ikki eydnast at útvega fleiri pláss til frítíðartilboð næstu tíðina, fara sostatt uml. 40 børn at standa á bíðilista til frítíðartilboð, tá komið er út í september.

Frítíðartilboð eru sera týdningarmikil fyri familjuna og barnið. Um tey ikki eru tøk, so gongur tað út yvir trivnaðin hjá barninum, tí barnið verður isolerað heima og fær ikki møguleikan at vera saman við øðrum javnlíkum.

Fyri foreldrini merkir tað ein fíggjarligan miss og ótryggleika í starvinum, tí tey noyðast úr arbeiði fyri at vera heima hjá barninum.

Frítíðartilboðið gevur møguleikar til foreldur við barni, ið hevur serligan tørv, at liva eitt vanligt og virkið lív og luttaka á arbeiðsmarknaðinum á jøvnum føti við onnur. Harumframt skulu børnini fáa somu tilboð sum onnur børn og harvið møguleikar at mennast í felagsskapi við onnur børn.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at vita, um landsstýrismaðurin hevur funnið eina loysn á økinum.

**Á Løgtingi, 4. august 2022**

Eyðgunn Samuelsen